# Eyðun Nolsøe 50 ár



19. januar verður Eyðun Nolsøe í Klaksvík 50 ár. Eyðun búði fyrstu barnaárini suðuri í Vági, men familjan flutti til Klaksvíkar, tá Eyðun var 9 ára gamal.

Foreldrini eru Jóhan Nolsøe, kallaður Hanni ættaður úr Vági og Signild Samuelsen dóttir Guðrun og Óla Martin Samuelsen í Klaksvík. Hanni var sonur Lauru og Jóhan Nolsøe í Vági. Eyðun er sostatt av navnframari ætt sunnan úr Vági. Abbin hevði handil og reiðaravirksemi og var ein av stovnarunum av bóltfelagnum VB. Hann varð seinni av vágbingum kosin heiðurlimur í VB. Frumritið av hesum heiðursbrævi er nú í tryggari varðveitslu hjá familjuni norðuri í Vági.

Túrarnir noður til móðurættina í Klaksvík vóru mangir í barnaárunum. Serliga jólafrítíðin 1966 gjørdist minnilig. Signild avgjørdi at vera hjá foreldrum sínum, sum vóru komin nakað til árs og Eyðun og bróðurin Jógvan Leivur gjørdust harvið klaksvíkingar. Pápin Hanni arbeiddi eisini í Klaksvík. Hann doyði eftir stuttari sjúkralegu í 1981.

Eins og navnin í "Frændir" er Eyðun kendur frá tónleikalívinum. Hann er kønur guittarspælari, men kann leika á fleiri ljóðførum. Eyðun er kendur frá bólkinum Hjarnar. Lunnarnir undir tónleikalívinum vórðu óivað lagdur í barnaárunum, tá Eyðun spældi í ymiskum kjallara- og garaguorkestrum í Klaksvík. Tónleikalívið kom seinni undir meiri skipaðar umstøður hjá Hans bónda, har Eyðun spældi saman við fleiri kendum tónleikarum og ikki minst systkinabarninum Karl Martin Samuelsen.

Liðugur við 10. flokk í 1974 arbeiddi Eyðun eitt skifti á bilverkstaðnum hjá Dávur Joensen og eisini á bedingini. Í 1975 fóru Eyðun í læru í deild sjóvinnubankans í Klaksvík, har Mikkjal á Bergi var lærumeistari. Eyðun starvaðist eitt skifti í Føroya Sparikassa, men síðani 1984 hevur hann arbeitt í Norðoya Sparikassa.

Eyðun hevur mong frítíðaráhugamál. Umframt tónleik og ítrótt dámar honum væl at fara á flot, og túrarnir niðan á Klakk eru mangir.

Starvfelagar og viðskiftafólk bera Eyðuni alt gott. Hann er arbeiðssamur, skemtingarsamur, fryntligur og sera røkin á øllum økjum.

Eyðun er giftur við Mathildu ið ættað úr Fuglafirði og búgva tey undir Brúnni í Klaksvík.

Saman eiga tey synirnar Hera og Jóhan.

Vit ynskja Eyðuni hjartaliga tulluku við føðingardegnum.

**Starvsfelagar**

---

## Andlát og jarðarferðir

**Mikkjal Mørk, ættaður úr Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 16. januar, 60 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 20. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 12. Tey, ið vilja minnast Mikkjal, kunna lata Herberginum eina peningagávu; konta í peningastovnunum.

**Niels Juul Joensen, ættaður úr Norðdepli, búsitandi í Klaksvík**, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi mikudagin 17. januar, 78 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum leygardagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni sunnudagin kl. 13.

**Helge Justinussen, bókbindari, Tórshavn** andaðist týsdagin 16. januar, 79 ára gamal. Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 14.

---

**Dagurin**

**20. januar. Brøðramessa.** Hildin til minnis um teir báðar Fabianus og Sebastianus. Teir eru ikki brøður, men vórðu fyri trúar sakir tiknir av døgum sama dag í árinum, Fabanus, sum var pávi, umleið ár 250, og Sebastianus – kristin hermaður – umleið ár 288. Tað sigst, at teir báðir eru jarðaðir undir tí núverandi kirkjuni San Sebastian í Róm. Fabianus er rómverskt ættarnavn. Sebastianus er upprunaliga grikst navn, ið merkir heiðurverdur.

**21. januar. Agnes**, deyð umleið ár 300. Halgisøgan um Sanktu Agnes er ein av teimum elstu frásøgnunum um blóðvitni í fornkirkjuni. Hon vildi giftast heidnum fríggjara og varð tikin av døgum. Grikst navn ið merkir: hin óspilta.

**22. januar. Vincentius**, deyður umleið ár 300 í Zaragoza. Píndur til deyða undir Diocletianus keisara. Navnið er lanínskt og merkir hin sigursæli.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæri pápi okkara

**Helge Justinussen**

Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum 16. januar,
79 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
fríggjadagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
leygardagin kl. 14.00.

**Kári, Paula, Marjun, Jens Christian og Hilda**

---

# Tøkk



Hjartans tøkk til øll tykkum, sum sýndu okkum hjálpsemi og samkenslu, tá ið kæri maður mín, góði pápi, sonur, beiggi, pápabeiggi, versonur og svágur okkara

**Bjarni í Sjúrðagarði**
Kaldbak

gjørdist álvarsliga sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Eisini takka vit hjartaliga øllum tykkum, sum vóru um Bjarna og hjálptu honum undir sjúkraleguni. Takk fyri tær mongu samkensluvitjanir, hjálpsemi og heilsanir, og til tykkum, sum hjálptu við tí stóra ervinum, eftir Bjarnasa ynski.
Tøkk til tykkum, ið hjálptu okkum við jarðarferðina og somuleiðis fyri tey góðu og troystarríku orðini í kapellinum, í Vesturkirkjuni og í Kaldbak. Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til okkum og Krabbameinsfelagið.
Øllum tykkum, ið fylgdu Bjarna til hansara síðsta hvíldarstað vilja vit somuleiðis takka, eins og fyri alla umsorgan, ið verður víst okkum í hesi sváru og døkku tíð.

*Vegna húskið*
**Kirstin, Teitur, Gurðið og Tyrni**
**Astrid, John og Óli Hans**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við